# Konsertir við Kim Sjøgren

**Fríggjadagin 8. apríl kemur kendi violinleikarin, Kim Sjøgren, til Føroya at hava konsertir, umframt ein sokallaðan master-class, har øll kunnu luttaka**

KONSERTIR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Kim Sjøgren er víðakendur violinleikari. Blaðungur gjørdist Kim limur í Kgl. Kapellinum og er hann yngsti konsertmeistari nakrantíð í hesum orkestri. Sum tónleikari hevur Kim altíð roynt nýggjar leiðir uttan at lata seg tøla av, hvat ið fólk vanliga meta verða rættast fyri ein tónleikara á hansara støði. Meðan hann var konsertmeistari, var hann stundum at síggja á gongugøtuni í Keypmannahavn sum gøtutónleikari. Hetta undraði fólk stórliga, tí samstundis ferðaðist Kim Sjøgren dúgliga runt og framførdi í kirkjum, fyri konsertfeløg og sum solistur við mætastu orkestrunum í landinum.

Á sín heilt egna hátt heldur Kim Sjøgren fast við, at tónleikur er samskifti, og einki skal binda hann at samskifta við øll fólk. Tað gav til dømis at bíta, tá Kim Sjøgren trein fram í donsku Grand Prix-kappingini og framførdi saman við Birthe Kjær. Eisini hevur Kim roynt seg sum sjónleikara í filmi og á palli.

Fyri stuttum varð Kim Sjøgren útnevndur professari á Det Jyske Musikkonservatorium.

Á konsertunum fer Kim at framføra sítt heldur øðrvísi solo-show, har hann er púra einsamallur á pallinum sum violinleikarin, tónleikarin, samskiftarin og undirhaldarin Kim Sjøgren. Eisini skipar Konsertfelagið saman við Tórshavnar Musikkskúla fyri einum sokallaðum master-class, har ið Kim Sjøgren fer at leggja ungum evnaríkum føroyskum violinspælarum lag á.

Skráin hjá Kim Sjøgren sær soleiðis út: Fríggjadagin 8. apríl kl. 17.00 Master-class í Norðurlandahúsinum (ókeypis atgongd)

Leygardagin 9. apríl kl. 19.00 Konsert í Ósáskúlanum, Klaksvík (saman við 17 sangarum)

Sunnudagin 10. apríl kl. 16.00 Konsert í Norðurlandahúsinum

# Fólk brúka framvegis pengar

**Stjórin í Norðoya Sparikassa harmast, at 70 arbeiðspláss í alivinnuni í Norðoyggjum hvørva innan tveir mánaðir, men hann vísir samstundis á, at tað gongur upp og niður í ymsum pørtum av vinnuni, og í løtuni gongur tað væl hjá øðrum. Og fólk hava framvegis stóran keypihug**

VINNA

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– Tað er ikki líkt til, at gongdin í samfelagnum hevur ávirkað keypihugin í Norðoyggjum, tí tær ábendingar, sum vit fáa frá handilslívinum er, at teir selja eins nógv í ár, sum teir gjørdu somu tíð í fjør, og onkrir handlar selja enntá meira, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa*

**Klaksvík:** Stjórin í Norðoya Sparikassa hevur langt frá mist mótið, nú alivinnan í Norðoyggjum er við at steðga upp.

70 arbeiðspláss á virkinum Kryvjing fara í søguna, og áður er alivirksemið á sjónum minkað niður í lítið og einki.

– Tað er spell, at tað skal hava gingið so illa í alivinnuni, og vit mugu venja okkum til, at arbeiðisloysið í Norðoyggjum fer at kvinka eitt sindur uppeftir næstu tíðina, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa.

### 70 arbeiðspláss burtur

Í farnu viku vóru 25 fólk søgd upp á virkinum Kryvjing í Klaksvík, sum virkar alilaks, og tey 35 fólkini, sum eru eftir til arbeiðis, verða send heim innan tveir mánaðir, tá ið eingin alilaksur er eftir at taka í Norðoyggjum. Tá ið flest fólk arbeiddu á Kryvjing, vóru tey 70 í tali, men um nakrar vikur eru hesi arbeiðspláss burtur.

– Kryvjivirkið er rímiliga nýtt, og tí eru hesi arbeiðsplássini ikki so gomul, men tað er sera spell fyri tað, at tey nú rúka. Alivinnan hevur verið í kreppu í eina tíð, men tað er líkt til, at áhugi hóast alt er millum íleggjarar fyri at seta pengar í alivinnuna aftur, og tí kann gongd koma á aftur vinnuna, heldur Eyðfinn Reyðberg.

### Fólk brúka tað sama

Spurningurin er so, hvørjar avleiðingar tað fær í Norðoyggjum, at ein heil vinna mest sum steðgar upp, og nógv arbeiðspláss hvørva.

– Vit hava vitað, at hetta fór at koma, tí støðan í alivinnuni hevur verið so vánalig. Men samstundis skulu vit ikki gloyma, at tað gongur upp og niður í ymsum vinnum, og í løtuni kunnu vit fegnast um, at tað gongur væl hjá Næraberg, sum hevur eini 120 ársverk umborð. Tað gongur eisini væl hjá øðrum skipum í flotanum, sigur Eyðfinn Reyðberg.

– Tað er ikki líkt til, at gongdin í samfelagnum hevur ávirkað keypihugin í Norðoyggjum, tí tær ábendingar, sum vit fáa frá handilslívinum er, at teir selja eins nógv í ár, sum teir gjørdu somu tíð í fjør, og onkrir handlar selja enntá meira.

– Í løtuni er avleiðingin av niðurgongdini, at fólk spara minni upp, men brúka tað sama. Um niðurgongdin í búskapinum verður størri og varðar leingi, so kemur tað sjálvandi eisini at ávirka keypihugin hjá fólki, sigur Eyðfinn Reyðberg.

# Tá matur er ein hóttan

**- Etingarólag snýr seg um so nógv annað, enn mat - í veruleikanum kanska minst um mat, men heldur um kenslur, sjálvsvirðing og eitt ynski um at hava tamarhald, segði Finn Skårderud, professari, millum annað á ráðstevnini um etingarólag á Hotel Føroyum mikudagin**

ETINGARÓLAG

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*– Etingarólag er eitt slag av sálarsjúku, har maturin og vektin bert eru sjúkueyðkenni um, at okkurt annað feilar, segði Finn Skårderud, professari, millum annað á ráðstevnuni um etingarólag*

Mikudagin skipaði Synergi fyri ráðstevnu um etingarólag. Á stevnuni luttóku ymisk fakfólk, lærarar, heilsusystrar umframt foreldur at børnum við etingarólagi.

– Hóast vit ongi hagtøl hava og ikki hoyra so nógv um tað, er tað er eingin ivi um, at etingarólag eisini er trupulleiki hjá nógvu føroyingum. Eftir at vit høvdu lýst við hesi stevnuni, vendu heilt nógv foreldur sær til okkum at frætta nærri, so tørvurin at varpa ljós á evnið er avgjørt til staðar, siga fyrireikarnir av stevnuni.

### Kenslur og tamarhald

Finn Skårderud hevur meir enn 20 ára royndir við sjúklingum, sum líða av etingarólagi. Í fyrilestrinum greiddi hann frá, at etingarólag í grundini er ein sálarsjúka, har tað er kenslan av at vera ov tjúkkur heldur enn veruleikin, sum fær sjúklingin at skúgva matin frá sær ella spýggja hann uppaftur.

Finn nevndi sum dømi eina kvinnu við etingarólagi, sum livdi saman við einum manni, hon ikki treivst saman við. Samlívið teirra millum var merkt av brigsli og illneitan, og kvinnan kendi eg alsamt tjúkkri og minni eiggiliga, tá hon var saman við honum. Seinni fann kvinnan saman við einum øðrum manni, sum var púra burtur í henni. Hetta fekk frá eini løtu til aðra kvinnuna at kenna seg klæna og vakra, hóast vektin segði júst tað sama.

Dømi er rættiliga typiskt, greiddi Finn frá, og vísir bara, at tá tað snýr seg um etingarólag, er maturin og harvið vektin bert eitt sjúkutekin um, at okkurt annað bagir. Ein orsøk til etingarólag er til dømis ynski um at hava tamarhald á sær sjálvum ella bara onkrum her í lívinum. Við at lata vera við at eta ella spýggja matin upp aftur kann sjúklingurin varveita eina støðuga vekt og harvið kensluna av at vera tann, ið stýrir. Tankin um at byrja at eta sum vanligt aftur verður rædandi, tí fyri sjúklingin merkir tað, at hann setir tamarhaldið á sær sjálvum í vanda. Eitt normalt forhold til mat verður sostatt ein hóttan móti allari sjálvsvirðingini, sjúklingurin hevur bygt upp um etingarólagið.

Hóast sjálvsmyndin hjá tí sjúka lítið og onki hevur við veruleikan at gera í eygunum á øðrum, ger tað ikki støðuna minni veruliga fyri tann sjúka. Finn Skårderup kom í hesum sambandi inn á, hvussu lærarar, pedagogar og foreldur kunnu koma á tal við tann sjúka og royna at seta seg inn í, hvussu hann fatar støðuna. Í øllum førum nyttar tað lítið bara at júka tann sjúka um at eta sum onnur, tí tað fær ongantíð loyst ein trupulleika, sum ikki snýr seg um mat.

Aftaná fyrilesturin hjá Finn Skårderud greiddu Heri Kragesten og Anna D. Henze, sálarfrøðingar, frá viðgerðarmøguleikum í Føroyum fyri etingarólag, har luttakranir eisini fingu høvi at seta spurningar.